FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

## Verkfrøðingur/ byggifrøðingur/arkitektur

(endurlýsing)

Til teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu er eitt starv sum verkfrøðingur/byggifrøðingur/arkitektur leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur:**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru:

- Útstykkingar
- Nýgerð og umvæling av vegum og kloakkum
- Havnabygging
- Útbygging og viðlíkahald av vatnverki
- Nýgerð og umvæling av kommunalum bygningum
- Byggimálsviðgerð

**Førleikakrøv:**
Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi/arkitekti sum sjálvstøðugt kann arbeiða við projektering og eftirliti v.m. innan nevndu virkisøki.

Tekniarbeiði verður gjørt á MicroStation forriti.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir saman við prógvum og upplýsingum um lívsroyndir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi **15. mars 2007 kl 16.00** á adressuni

**Fuglafjarðar kommuna**
Tekniska deild
Postboks 30
530 Fuglafjørður

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær Pætur Joensen, býarverkfrøðing, tlf. 444006, lokal 17, e-postur: patur@fuglafjordur.fo

**Fuglafjørður, 26. februar 2007**
**Fuglafjarðar býráð**

## Hagafundur

### fyri Innastahaga í Skálavík

Hagafundur fyri Innastahaga verður á Keldu sunnudagin 11 mars 2007 kl. 1500.

Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður nýggjur eyka - hagafundur lýstur at verða kl 1600 sama dag.

1) Framløga av roknskapi
2) Val av hagastýri
3) Ymiskt

*Hagastýrið*

# STJÓRI í P/f Stóratjørn



**Verkætlanin við Stórutjørn í Hoyvík er tann størsta í Føroya søgu, og í tí sambandi er tørvur á einum dugnaligum stjóra, sum kann hava ta dagligu leiðsluna um hendi og samskipa tey ymisku viðurskiftini, sum gera seg galdandi í sambandi við eina slíka verkætlan.**

**Arbeiðsøki:**
Verkætlanin er sera umfatandi, og er tí talan um eitt spennandi og krevjandi starv við nógvum avbjóðingum. Tað hevur tí alstóran týdning, at tú ert áhugað/-ur og leggur orku í starvið.

Í fyrstu syftu fært tú ábyrgdina av at samskipa, fyrireika og leiða tey ymisku viðurskiftini í sambandi við verkætlanina, meðan byggibúningin og byggingin fer fram.

**Førleikakrøv:**
Tørvur er fyrst og fremst á einum framsøknum og ágrýtnum persóni, sum fær uppgávurnar loystar, og sum ikki er ræddur fyri at taka á seg nýggjar og annarleiðis avbjóðingar.

Viðkomandi skal hava royndir og helst útbúgving innan leiðslu- og fíggjarstýring, t.d. sum cand. merc, verkfrøðingur við HD el.líkn., men eiga krøv til útbúgving ikki at halda royndum persónum frá at søkja starvið.

**Setanarviðurskifti:**
Stjórastarvið er ikki tíðaravmarkað og verður lønin avtalað nærri og verður støðið annars samsvarandi avbjóðingunum.

**Umsóknir:**
Umsókn um starvið verður viðgjørd í trúnaði og skal verða skrivlig og latast skrivstovuni saman við CV **innan 16. mars 2007 kl. 16.00.**

Nærri fæst annars at vita við at venda sær til Annfinn V. Hansen, adv., e-mail annfinn@advokat.fo.

ADVOKATFIRMA ANNFINN V. HANSEN
Annfinn V. Hansen, adv. | Djóni Thomassen, adv. | Rannvá Ragnarsdóttir, adv.
Bryggjubakki 22 | Postsmoga 106 | 110 Tórshavn | tlf. 359595 | fax. 359596

# TVØROYRAR KLUBBI

**ONSKVØLDIÐ 28. februar**
**KORT SPÆL & FÓTBÓLTUR**
**kl. 19.00 - 24.00**

**FRÍGGJAKVØLDIÐ 2. mars**
**5'ARI** – **kl. 17.00 -19.00**
**BARRQUIZ & DISKOTEK** – **kl. 21.30 - 04.00**

**LEYGARKVØLDIÐ 3. mars**
**LIVERPOOL - MAN UNITED** – **kl. 12.45**
**5'ARI** – **kl. 17.00 -19.30**
**BINGO** – **kl. 19.30**
**DANSUR v/ Blanding** – **kl. 23.00 - 04.00**

**SUNNUKVØLDIÐ 4. mars**
**5'ARI**
**kl. 17.00 -20.00**

**BARRQUIZPULJAN**
**1880,-**

**Øll eru vælkomin**
**18 ára aldursmark**

**TVØROYRAR KLUBBI**
**Telefon 371020**